# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Gullbrúðarparið Jolina og Torleif Bech

## í Porkeri 18. desember 2005



Sunnudagin 18. desember kundu hjúnini Jolina og Torleif Bech í Porkeri halda gullbrúdleyp.

Mamma er ættað Innan Glyvur, dóttir Johannu og Marius Bertholdsen. Pabba er ættaður úr Porkeri, sonur Johonnu og Jacob Bech í Hólinum.

Mamma fór sum 13 ára gomul út at tæna. Hon hevði sum 6 ára gomul mist mammuna, og tá hon var 12 ár, fórst pápin við Guiding Star«, so byrjanin upp á lívið var alt annað enn løtt.

Eftir at tey vórðu gift, hevur hon verið heimaarbeiðandi meðan vit vóru smá; men seinni arbeiddi hon nøkur ár sum flakakvinna á Polarfrost.

Pabba hevur verið sjómaður meginpartin av arbeiðstíð síni. Fór at rógva út sum 14 ára gamal. Var síðani til skips í mong ár. Fór fyrst við »Yvonnu«, ið var heimahoyrandi í Vági. Seinni var hann við »Beinisørð« og við »Ósa«, ið abbin átti saman við øðrum. Pabba var parteigari í »Vágbingi«, og var við honum til hann varð seldur. Hann var við norskum og íslendskum trolarum í fleiri ár, til hann fór at sigla við »Jens Chr. Svabo« og tey seinastu árini við »Magnus Heinason«. Hann var eisini við »Leivur Øssursson« á royndarveiðu eftir svartkjafti. Øll hesi ár pabba var á sjónum, tók mamma sær av øllum tí húsliga, bæði at passa fenaðin og alt annað, ið hoyrdi til eitt føroyskt heim.

Pabba hevur altíð havt stóran áhuga fyri seyði. Hann hevur verið seyðamaður í Handara Parti í umleið 40 ár, og hevur hann sera gott eyga fyri seyði og seyðarøkt. Pabba hevur gingið nógv burtur í haga, og kennir hann tí væl staðarnøvn bæði uttan- og innangarðs.

Væl hevur ligið fyri hjá mammu, tá ræður um mat og matgerð. Gestablíð hevur hon altíð verið, og hevur duga væl at hugna bæði um okkum børnini og øll, ið eru komin á gátt. Jú, sanniliga hava vit sum børn nógv gott at minnast afturá, bæði av handaligum- og andaligum virðum.

50 ár er long tíð, og mong hjún uppliva ikki hendan stóra dag. Gullbrúdleypsdagin fara tit at halda í heiminum saman við ætt, vinum og kenningum. Vit vita eisini, at tit av hjarta siga, Honum, ið øllum valdar, takk fyri at tit fingu loyvi at liva saman í kærleika í samfulla hálva øld.

Vit gleða okkum til at halda dagin saman við tykkum.

Hjartaliga tillukku við ynski um Guds signing fyri framtíðina.

**Børnini við familju**

# Thomas Elias Joensen

## føddur í Froðba 18. august 1930, deyður 13. juni 2005



Bert nøkur fá hugarensl nú tað stundar til jólahátíðina, og at tú var tikin burtur aftan á stutta sjúkralegu.

Meðan alt tað vakra á foldum spíraði, fjaraði títt mangan baldruta, og av okkum, sum stóðu tær nær og vistu um tína lívslagnu, lív burtur.

Men hetta lívið hevði eisini lært teg at vera nøgdan við tann krossin, sum tú hevði fingið at bera her niðri.

Staddur langt heimani frá og jólini eru fyri framman, renna mær mangar løtur í huga saman við tær, eitt nú tá ið jólini komu, hevði tú sjálvur syrgt fyri, at hvør einasti av "tínum" ikki var gloymdur.

Góði Elias! tú elskaði lívið og var so ómetaligur glaður fyri tað. Tú lærdi okkum nógv, tá tú við tínum smíli og nøgdsemi var ímillum okkum.

Tú hevði glett teg til at halda 75- ára føðingardegin í august mánað, men hann, sum tú hevði givið lív títt í hond, vildi tað øðrvísi og við vissuni um, at hann gjørdi tað íð best var, fór tú óræddur inn um deyðans gátt.

Ja, fyri okkum, sum vóru um teg ta seinastu løtuna, kendist tað, sum tað stendur skrivað um Lazarus hjá Lukkas kap. 16. ørindi 20, "hann varð av Einglum Guds borin í fang Abrahams."

Hósdagin 16. juni í fagrasta summarveðri vart tú lagdur til hvíldar í eina myrka grøv, men sum Frelsari okkara reis úr grøvini páskamorgun, verður likam títt ikki liggjandi í grøvini, men skal rísa upp til æviga sælu.

Góði Elias! takk fyri at vit lærdu teg at kenna, og alt tú gav okkum og ikki minst at virða tað sum í mannaeygum mangan tykist lítisvert.

Jólini eru fyri framman; eitt pláss verður tómt við borðið, har tú plagdi at sita við tínum glaða og vinsama smíli. Vit sakna teg nógv.

Hvíl í friði.

*Umborð á Ennibergi undan jólum 2005.*

**Hans Vilhelm**

# Havgrímur Hammer, Tvøroyri

## f. 21. sept. 1935 - d. 5. nov. 2005.



Lívið er ein gáva, sum tú hevur í avmálda tíð - tú kemur í heimin, men skalt burtur aftur hiðani. Hóast henda ófrávíkiliga veruleika, so koma deyðsboð altíð dátt við og serliga, tá talan er um ein av tínum kæru ella onkran, sum tú hevur verið nógv saman við, og herfyri komu so boðini um, at Havgrímur Hammer var farin.

Havgrímur Hammer varð borðin í heim í Hovi hin 21. sept. 1935, men hóast hann stóran part av lívi sínum búði og arbeiddi á Tvøroyri, gloymdi hann ikki heimbygd sína Hov.

Lærari gjørdist Havgrímur í 1958, men áðrenn hann tók við starvinum sum lærari á Tvøroyri í 1961, hevði hann verið lærari í Øravík og Øravíkarlíð og á árskeiði á Danmarks Lærerhøjskole

Hann útinti sítt arbeiði við lív og sál, sum starvsfelagarnir, sum hava havt hann sum lærara og flokslærara eisini minnast við virðing. Heldur ikki skulu gloymast næmingaferðirnar, har Havgrímur saman við konuni Ellu, var ferðaleiðari.

Havgrímur setti ikki bara spor í sínum dagliga skúlayrki. Hann sat fleiri ár í kommunustýrinum umboðandi javnaðarflokkin, har hann gjørdi sítt ítarsta fyri trivnaðin og arbeiðsmøguleikarnar í Tvøroyrar kommunu m.a. við at seta skjøtil á skúlaútbyggingar og Tvøroyrar Flakavirki.

Havgrímur hevði sín stóra lut í, at Føroya Keypssamtøka læt upp deild í Suðuroynni.

Saman við Jóhannes Enni savnaði hann tilfar til bókina Suðuroyarsagnir, sum kom út í 1977.

Í lærarastovuni var Havgrímur mangan miðdepilin við sínum fyndugu orðum um skúla og samfelagið alt, og so dugdi hann so sera væl at greiða frá og skemtast.

Havgrímur fór frá sum lærari í 1997, ikki vegna aldur, men sjúku, sum hann tá hevði stríðst við í nøkur ár. Treiskur, sum hann var, royndi hann at berjast ímóti, men ikki vildi sjúkan honum náðir.

Við samkenslu og bestu ynskjum til tykum, hansara kæru, drýpa okur høvur og minnast við virðing og takksemi læraran, starvsfelagan, ítróttarmannin, frásøgumannin, skemtaran og kommunalpolitikkaran Havgrím Hammer og takka fyri, at eisini okur fingu lut í hansara lívi.

**starvsfelagarnir**

# Jólasangløta í Siloa í Fuglafirði

TÍÐINDASKRIV

Mikukvøldið 21. december kl. 21.00 verður hugnalig jólasangløta í SILOA í Fuglafirði. Ætlanin er at gera kvøldið so fjølbroytt sum møguligt. Vit fara at syngja nakrar felagssangir saman og fara at hoyra góðan kórsang og solosang.

Klæmint Eliasen fer at leiða løtuna og framførdslur verða við hesum bólkum og solosangarum: Lítið kór úr Siloa, Bárður á Lakjuni, Durita M. Jacobsen og sangbólkurin SALT.

Aftaná bjóða vit øllum til ein jólaligan drekkamunn. Vit vóna, at nógv fólk seta sær eina løtu av og koma í SILOA hetta kvøldið. Sangløtan er ókeypis.

### Dagurin í morgin

**20. desember. Ábraham**. Dagur til minnis um patriarkin Ábraham. Bíbilska navnið merkir *faðir at mongum.*